



## ÁRSINS BÓLKUR 2009:

# PÁLL FINNUR PÁLL

SKEMTINGARSAMI, FÓLKSLIGI OG FÚLI BÓLKURIN PÁLL FINNUR PÁLL VANN HEIÐURSLØNINA SUM ÁRSINS BÓLKUR. TEIR HAVA SEINASTA ÁRIÐ FRAMFØRT TIL FLEIRI FESTIVALAR OG HAVA FERÐ EFTIR FERÐ HAVT STÓRAR KONSERTIR, HAR FÓLKIÐ NÆRMAST ER Á GOSIÐ, OG TEY FLESTU SYNGJA VIÐ TIL NÆRUM ALLAR SANGIR TEIRRA. TEIR HAVA Í ÁR GIVIÐ ÚT FLØGUSAVNIÐ "DU VED, AT GJØRT ER GJØRT", SUM ERU TRÍGGJAR FLØGUR, SUM TEIR HAVA GIVIÐ ÚT ÁÐUR, OG EIN LIVE FLØGU, SUM VAR UPPTIKIN Á FUTT Í BÝIN 2009

**Barbara Holm**
**barbara@sosialurin.fo**

- Vit prátaðu um hesa heiðurslønina aftaná vit høvdu móttikið hana, og vit eru ótrúliga glaðir fyri at hava vunnið hetta. Vit hava ongantíð vunnið nakað áðrenn, tí er tað ein stórur heiður, at vinna eina so stóra virðisløn sum ársins bólk, sigur Finnur Jensen, ein av oddamonnunum í bólkinum.

Hetta er fyrstu ferð at Páll Finnur Páll hava verið tilnevndir til Planet Awards. Teir hava einaferð áður vunnið eina heiðursløn, og tað var til AME 2005, har teir vunnið heiðursløn, fyri mest spælda lag í útvarpinum.

- Tað , sum ger hetta heilt serligt er, at fólk hava brúk pengar uppá at atkvøða fyri okkum. Tað taka vit sum eitt herðaklapp, sigur Finnur Jensen.

Páll Finnur Páll framførdu eisini í REX sunnukvøldið, og eins og altíð vóru tað tey skemtingarsomu, fúlu tabuløgini hjá teimum, sum domineraðu.

- Vit hildu allir, at tað var eitt ordiliga gott tiltak. Tað var væl fyriskipað, góður stemningur og gott fólk. Eg má siga, at eg kanska ikki væntaði, at tað fór at rigga so væl við gallatemaðinum, men tað var professionelt og stuttligt alt kvøldið, og fólk vóru við uppá tað, sigur Finnur Jensen.

Páll Finnur Páll hava verið ein aktørur á tónleikapallinum í nøkur ár, og bólkurin byrjaði upprunaliga við teimum trimum Páll Oddur Rubeksen, Finnur Jensen og Páll Hammer. Síðani hava teir fingið aðrar tónleikarar aftrat sær, og eru nú seks tónleikarar í bólkinum.

- Eg føli onkursvegna, at hetta seinasta árið hevur verið ótrúliga gott hjá okkum. Vit eru umsíðir ein bólkur við seks limum, og vit eru ikki longur eitt lítið prosjekt. Eg føli, at fólk taka væl ímóti okkum. Tey keypa okkara fløgu, koma til okkara konsertir, og tað er tað sum ger, at vit tíma at blíva við, sigur Finnur Jensen.

Finnur heldur eisini, at heiðurslønin sum ársins bólk er ein staðfesting av teirra succses í 2009.